# Giggs leingir sáttmálan

Ryan Giggs og Manchester United eru komin ásamt um nýggjan sáttmála, sum er galdandi til og við summarið 2010. Giggs, sum í dag er 35 ár, hevur spælt við besta liðnum hjá Manchester United síðani 1991, og roknað verður við, at nýggi sáttmálin eisini merkir, at hetta verður einasta felagið, sum hann fer at spæla við á hægsta støði. Giggs hevur millum annað metið sum tann spælarin hjá Manchester United, ið hevur spælt flestar dystir. Málið hjá honum seinasta sunnudag syrgdi fyri, at hann hevur skorað í bestu røðini í 17 kappingarár á rað, og eitt nú hevur hann verið enskur meistari ikki færri enn 10 ferðir.



# Bryant setti nýtt met

Kobe Bryant gjørdist hósnáttina yngsti spælarin nakrantíð, sum hevur skorað 23.000 stig í NBA. Kobe Bryant var 30 ár og 171 dagar, tá hann rakk teimum 23.000 stigunum í dystinum hjá LA Lakers ímóti Oklahoma City Thunder. Undan hesum átti Wilt Chamberlain metið. Hann var 30 ár og 176 dagar gamal, tá hann rakk marknasteininum.

# Tøkur til landsliðið

**- Eg eri sjálvandi altíð til reiðar at umboða Føroyar, og kropsliga eri eg aftur førur fyri tí - meira enn so, staðfestir Julian Johnsson, sum eigur avgerandi leiklut í frálíku gongdini hjá FC Svendborg seinnu árini**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*Eru boð eftir Juliani Johnsson, er hann framvegis tøkur at umboða Føroyar sigur hann*

Hann gav seg altíð fult út. Um tað so var á Svangaskarði, í Gundadali ella í gamla Jugoslavia. Hann treiskaðist og stríddist eftir bóltinum í samfullar 90 minuttir. Líkamikið, hvørjir mótstøðumenninir vóru. Men brádliga endaði alt.

Við eini bókaútgávu á jólum í 2006 staðfesti Julian Johnsson, at hann gavst í føroyskum fótbólti og á landsliðnum. Ein álvarsamur skaði í knænum helt honum uttanfyri í longri tíð, og hann flutti til Danmarkar. Men hann var ikki leingi burtur frá fótbóltsvøllinum, og í dag eigur hann avgerandi leiklut í stóru menningini í felagnum FC Svendborg seinnu árini.

## Klárur til landsliðið

Julian Johnsson hevur ikki verið á landsliðnum, síðan føroyska landsliðið í september 2006 tapti 0-6 á útivølli móti Skotlandi. Hóast stríðshugaði miðvallarin ikki hevur spælt fótbólt á serliga høgum støði øll árini síðan, er hann aftur førur fyri umboða føroyska landsliðið.

- Eg eri sjálvandi altíð til reiðar at umboða Føroyar, og kropsliga eri eg aftur førur fyri tí – meira enn so, sigur Julian Johnsson.

33 ára gamli miðvallarin hevur í alt spælt 62 landsdystir og skotið fýra mál fyri føroyska landsliðið.

## Hava góðar vónir

Tað hevur gingið skjótt fyri seg í FC Svendborg seinnu árini. Felagið – sum skifti navn í fjørsummar – vann sær fyri mánaðum síðan pláss í triðbestu deildini, og strembar nú eftir at sleppa upp millum tey bestu í Danmark. Og tað gongur væl. FC Svendborg liggur í løtuni á sjeynda plássinum, bara fimm stig frá play-off plássunum.

- Ætlanin var at fáa SFB, sum liðið kallaðist tá, upp úr Danmarksseriuni, og at menna eitt felag við potentiali. Tað hevur riggað væl, og nú hava vit DBU-sáttmálar, og til lokaluppgerðina móti FC Fyn herfyri vóru fleiri enn 2.000 áskoðarar, greiðir Julian Johnsson frá, sum er liðskipari og ein av undangongumonnunum á liðnum.

*Hvussu eru vónirnar fyri uppflyting?*

- Í byrjanini av kappingarárinum hugsaðu vit mest um at varðveita sætið í deildini. Men tað vísti seg, at vit liggja væl fyri í stríðnum um uppflyting í næstbestu deildina, hóast hetta er fyrsta árið hjá okkum í 2. division Vest. FC Fyn fer allarhelst at flyta beinleiðis upp, tí har eru fleiri fulltíðaryrkisleikarar. Tað verður eisini avgerandi, at eykaliðini hjá AaB, OB og Esbjerg ikki hava ov nógvar superligu-reservur, tá vit skulu spæla móti teimum. Vit hava í øllum førum góðar vónir, sigur stríðsmaðurin í Svendborg.

Julian Johnsson gongur í løtuni á sættu lestrarhálvu á Skårup Seminarium, og í komandi ári verður hann eftir ætlan útbúgvin lærari.

## Onnur tilboð

Langlimaði miðvallarin hevur av álvara gjørt vart við seg í donskum fótbólti. Síðan uppflytingina í summar hava fleiri feløg sýnt honum áhuga, har Todi Jónsson eisini fegin vildi sæð fyrrverandi liðfelagan á landsliðnum á sínum liði.

- Eg havi fingið ítøkiligt tilboð frá Lolland Falster Alliancen, og FC Amager hevur eisini sýnt mær áhuga. Eg eri tó á DBU-sáttmála, og leiðslan í FC Svendborg vildu ikki sleppa mær. Eg havi fingið tilboð at leingja sáttmálan her við einum ári, men havi valt at bíða við at svara. Tað eru sera freistandi ítróttarliga at royna seg í Viasatdeildini (næstbesta deildin, blðm.), um vit klára at flyta upp. So í løtuni er framtíðin ógreið, sigur Julian Johnsson.

### FAKTA

**Navn:** Julian Schantz Johnsson
**Føddur:** 24. februar, 1975
**Felag:** FC Svendborg
**Pláss:** Miðvøllur
Fyrrverandi feløg: Daugård IF, HB, B36, Kongsvinger IL, Sogndal IL, Hull City, IA Akranes og B68
**Landsdystir:** 62 dystir og fýra mál

# Landsliðsvenjarin skal vera útlendingur

**- Ein útlendskur venjari hevur sum uttanveltaður lættari við at vera objektivur viðvíkjandi landsliðsúttøkum, samanborið við ein lokalan føroying, sigur Julian Johnsson, sum hevur sínari greiðu metingar um komandi landsliðsvenjaran**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Við sínum 62 landsdystum á baki hevur Julian Johnsson verið millum teir heilt drúgvu á føroyska landsliðnum. Og stríðsmaðurin í Svendborg hevur eisini sínar metingar um komandi landsliðsvenjaran.

- Landsliðsvenjarin má hava royndir sum yrkisleikari og venjari úr Evropa, og gjarna hava góð úrslit at vísa á. Hann skal kunna laga seg eftir ymsum fótbóltskulturum. Soleiðis er lættari hjá honum at skilja føroyska hugburðin, og samstundis geva av sær við sínum fakligu og menniskjaligu eginleikum. Hann skal hava mál í sínum starvi, sum passar til føroyska landsliðið, sigur Julian Johnsson, sum metir tað vera neyðugt, at komandi landsliðsvenjari umboðar Føroyar á positivan hátt, so føroyskir leikarar kunnu royna seg uttanlands.

- Og hann má og skal duga at fáa tað besta burturúr einstaka leikaranum og vera róligur og umhugsin, tá hann tosar við fjølmiðlarnar, staðfestir Julian Johnsson.

*Hevur tjóðskapurin nakran týdning?*

- Ja. Føroyar er eitt lítið og sterkt oyggjarsamfelag, og øll hava sína meining um landsliðsvenjaran. Ein útlendskur venjari hevur sum uttanveltaður lættari við at vera objektivur, samanborið við lokalan hugburð og sjónarmið viðvíkjandi landsliðsúttøku. Og tað eru leikararnir greiðir yvir. Harvið er ikki sagt, at føroyingar ikki kunnu roynast væl sum venjarar uttanlands.

*Realistisk sæð, hvønn sært tú sum komandi landsliðsvenjara?*

- Colin Calderwood ljóðaði sera áhugavert. Tað hevði eisini verið áhugavert at fingið ein mann sum John Faxe Jensen til Føroya. Eg meti, at íslendingurin Teitur Thordarsson, sum í løtuni er í Kanada, kundi passað væl til føroyska landsliðið. Eg havi tó ikki innlit í lønarviðurskiftini hjá FSF, og kann tí ikki siga, um tað er realistiskt ella ikki, sigur Julian Johnsson.